LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

# ÁRSFRÁGREIÐING UM EFTIRKANNING

## LØGTINGSÁRIÐ 2021

29. juli 2021 – 28. juli 2022

# LÓGARTÆNASTAN

## Formæli

Við gildi frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd. Eftirkanningin fer fram eftir ásetingunum í **rundskrivi um eftirkanning** og **rundskrivi um lógarsmíð.**

Tað er lógartænastan á Løgmansskrivstovuni, sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum. Á lógartænastuni eru fimm starvsfólk, av hesum eru tríggir løgfrøðingar. Arbeiðið er skipað soleiðis, at øll eru við í eftirkanningararbeiðinum. Løgfrøðingarnir hava ábyrgd av tí løgfrøðiligu eftirkanningini, meðan hini bæði starvsfólkini hava ábyrgd av tøkniligu eftirkanningini.

Rundskriv um eftirkanning ásetir, at uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli, samtyktar, kunngerð, rundskriv, leiðbeining, bekendtgørelse, lovbekendtgørelse og anordningsbekendtgørelse skulu eftirkannast. Tað er ásett, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskotum og eisini, hvat lógartænastan ikki eftirkannar.

Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot eisini málfrøðiliga. Tað er tí ábyrgdin hjá tí einstaka stjórnarráðnum at ansa eftir, at uppskot til lógir og kunngerðir eru málsliga lýtaleys.

Lógartænastan skal hava minst 5 yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot. Í hesum sambandi fara vit á minna á, at uppskotini skulu sendast til eftirkanningar, áðrenn tey verða send til politiskan landsstýrisfund, men aftan á at tey hava verið til ummælis.

Í løgtingsárinum 2021 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 212 uppskot. Lógartænastan eftirkannaði 95% av uppskotunum innan 5 dagar, og 99% av uppskotunum vóru eftirkannað innan 8 dagar.

Hetta er áttanda ársfrágreiðingin, sum verður givin út. Endamálið við útgávuni er framvegis at kunna stjórnarráðini um ymiskt viðvíkjandi lógarsmíði og at siga frá okkara royndum seinasta løgtingárið, og hvussu hetta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Eisini er ein partur um ummælistíðir hjá stjórnarráðunum, viðgerðina í Løgtinginum og yvirlit yvir rættarreglur, sum eru kunngjørdar í Kunngerðablaðnum.

Løgmansskrivstovan, 16. desember 2022

**Nella Festirstein**
Deildarstjóri

# Innihaldsyvirlit


**1. Løgfrøðiliga eftirkanningin** 4
- 1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina 4
- 1.2. Prosesspartar í rættarmálum 4
- 1.3. Reglur um kæru 5
- 1.4. Úrgildisseting 5
- 1.5. Árlig javning av veitingum o.tíl. 5
- 1.6. Reglur um endurgjald í kunngerð 5
- 1.7. Undantøka av kunngering av listum hjá millumtjóða felagsskapum ella londum 5
- 1.8. Fyrisitingarlig sektaruppskot 5
- 1.9. At umseta danskt mál til føroyskt 6
- 1.10. Nýggj lóggáva um náttúruvernd 6
- 1.11. Tvingsilssektir 6
- 1.12. Pantiheimild 6
- 1.13. Líkagrundreglan og saklig atlit 7
- 1.14. Tung og teknisk uppskot 7
- 1.15. Heimild at móttaka gávu frá privatum grunni 7
- 1.16. Bráðfeingis bann 7
- 1.17. Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu 7

**2. Tøkniliga eftirkanningin** 8
- 2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina 8
- 2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti 8
- 2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur 8
- 2.4. Skabelónir 9

**3. Yvirlit yvir eftirkanningar** 9
- 3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni 9
- 3.2. Yvirlit yvir uppskotini 10
- 3.3. Hvat siga tølini? 11
- 3.4. Longd á eftirkanning 12

**4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum** 13
- 4.1. Løgmansskrivstovan 13
- 4.2. Fíggjarmálaráðið 13
- 4.3. Umhvørvis- og vinnumálaráðið 14
- 4.4. Fiskimálaráðið 14
- 4.5. Uttanríkis- og mentamálaráðið 14
- 4.6. Almannamálaráðið 14
- 4.7. Heilsumálaráðið 14

**5. Ummælisportalurin** 14
- 5.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin 14
- 5.2. Ummælisfreistir 15
- 5.3. Samanumtøka um ummælisfreistir 15
- 5.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin 16

**6. Kunngerðablaðið** 17
- 6.1. Kunngering í tingárinum 2021 17

# 1. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 3.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.
>
> 3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Vit fara at taka fram nøkur av teimum evnum, ið vit hava sæð í eftirkanningini í hesum tingárinum.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini í stóran mun taka undir við viðmerkingunum, sum tey fáa til eftirkanningina. Um ráðið heldur, at okkurt er ógreitt, ella tey ikki eru samd við metingina hjá lógartænastuni, samskifta vit við ráðið um hetta, og sum oftast koma vit til eina felags fatan.

Í hesi ársfrágreiðingini taka vit einstøk evni upp, sum hava verið frammi í tingárinum, ella evni sum tað hevur verið spurt um, og slíkt sum vit framhaldandi halda eiga at gerast betur.

## 1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina

> 7.2. Løgtingslógir: Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan EMRS, revsilóg, fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit og løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.
>
> 7.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, pantireglum, fyrisitingarligum sektaruppskotum, heimild at áseta gjald, eftirlitsásetingum, afturtøka av løggilding, revsireglum, gildiskomureglum, skiftisreglum, kærureglum o.tíl.
>
> 7.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri bæði løgtingsmenn og borgaran, at sundurbýti í lógargreinar, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.
>
> 7.6. Kunngerðir: Formligu krøvini til kunngerðir eru sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.

## 1.2. Prosesspartar í rættarmálum

Í einum lógaruppskoti var ásett, hvør myndugleiki var prosesspartur í rættarmálum.

Ásett var, at úrskurður hjá Føroya Kærustovni kann av kærara og TAKS skjótast inn fyri Føroya Rætt, og tá ið úrskurður hjá Føroya Kærustovni verður skotin inn fyri Føroya Rætt, eru TAKS ávikavist skattagjaldarin ella tann avgjaldsskyldugi rætti saksøkti.

Vanliga skipanin er, at ein undirskipaður myndugleiki ikki kann kæra um avgerðir frá einum yvirskipaðum myndugleika ella kærumyndugleika. Undirskipaði myndugleikin skal einans útinna avgerðina hjá t.d. kærumyndugleikanum.

Á skattaøkinum er hetta av ávísum orsakum øðrvísi – hjá okkum nokk mest sambært siðvenju, men í Danmark er tað ásett í lóg, hvør er prosesspartur í rættarmálum. Har er tað ásett í skatteforvaltningslovens § 49, at skatteministeriet er prosesspartur. T.v.s. at tað er Skatteministeriet, sum saksøkir borgara ella virki, sum hevur fingið viðhald í Landsskatteretten (Føroya Kærustovni í Føroyum). Somuleiðis er tað skatteministeriet, sum er prosesspartur, um ein borgari ella virki leggur eina skattarættarliga avgerð fyri rættin.

Lógartænastan viðmerkti, at tað skipanarliga er rættari, at tað er tann ovasti fyrisitingarligi myndugleikin (her Fíggjarmálaráðið), sum er prosesspartur

í slíkum málum í staðin fyri, at ein undirskipaður myndugleiki sum TAKS kann leggja avgerðir hjá einum kærumyndugleika fyri rættin. Mælt varð tí til, at Fíggjarmálaráðið umhugsaði, um tað ikki er Fíggjarmálaráðið, sum er prosess-partur, og ikki TAKS. Fíggjarmálaráðið tók ikki undir við tilmælinum.

## 1.3. Reglur um kæru

Í kunngerðina skuldu setast inn reglur um, at Umhvørvisstovan skrivar út og tekur avgerð um vápnapass. Í kunngerðini vóru frammanumdan ongar reglur um kæru, tí tað hevði ikki verið neyðugt.

Lógartænastan mælti Løgmansskrivstovuni til at umhugsa kæruspurningin viðvíkjandi avgerðum hjá Umhvørvisstovuni um vápnapass. Sambært heimildarlógini var møguligt at áseta, at avgerðir av minni týdningi ikki kunnu kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika, ella at avgerðir hjá Umhvørvisstovuni innan 4 vikur kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

Lógartænastan minti á, at í báðum førum mátti inngangurin í høvuðskunngerðini umorðast fyri at seta heimildarásetingina um kæru inn í inngangin.

## 1.4. Úrgildisseting

Sambært frágreiðandi heitinum í uppskotinum skuldi eitt undantak bara vera galdandi til og við 15. juni 2022. Lógartænastan mælti til, at tað í gildiskomu-regluni í broytingarkunngerðini eisini var ásett, at kunngerðin fór úr gildi 16. juni 2022.

## 1.5. Árlig javning av veitingum o.tíl.

Talan var um eina kunngerð um javningarprosent fyri almannaveitingar, sum verður ásett árliga. Lógartænastan mælti til at seta árstal inn í heitið á kunngerðini, soleiðis at tað sást í heitinum, hvat ár kunngerðin fevndi um.

## 1.6. Reglur um endurgjald í kunngerð

Í eini kunngerð var ein áseting, sum tóktist at hava sum fyritreyt, at tað var objektiv ábyrgd fyri feilir. Vanligu endurgjaldsreglurnar hjá okkum áseta, at man ábyrgist fyri skaða ella feilir, sum man hevur gjørt við vilja ella av ósketni. Mælt varð tí til at strika hesa áseting. Um aðrar endurgjaldsreglur skulu ásetast enn tær vanligu, so eigur tað at ásetast í lógini. Tað var tí neyvan heimild fyri at seta slíka áseting í kunngerð.

## 1.7. Undantøka av kunngering av listum hjá millumtjóða felagsskapum ella londum

Í lógaruppskotinum var ein áseting um at tiltøk, ásett í reglum, sum hava heimild í løgtingslógini, kunnu vísa til listar hjá millumtjóða felagsskapum ella londum yvir likamligar og løgfrøðiligar persónar, eindir, partar, lutir, tøkni, tænastur ella onnur týðandi viðurskifti.

Lógartænastan mælti til at umhugsa, um tað skal vera heimild at undantaka kunngering av listanum í Kunngerðarblaðnum. Um ongin heimild er til undan-tøku viðv. kunngering, eigur listin at verða lagdur við sum skjal til kunngerðina, tá ið kunngerð um ávís tiltøk verður kunngjørd.

Undantøka frá kunngering kann verða loyvd, um listin t.d. er langur, verður broyttur ofta, og at tað tí ikki er skilagott at kunngera listan, tí hann støðugt broytist. Í staðin kann vísast til listan t.d. á eini heimasíðu. Ein møgulig orðing kundi vera: Hesir listar kunnu verða undantiknir frá kunngering í Kunngerða-blaðnum.

## 1.8. Fyrisitingarlig sektaruppskot

Í einum lógaruppskoti var heimilað einum landsstovni at geva fyrisitingarligt sektaruppskot fyri brot á lóggávuna í teimum førum, tá ið stovnurin metti, at nøktandi greidleiki var á veruligu umstøðunum í málinum, og at brotið ikki kom undir strangari revsing enn sekt. Um tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda sektina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist, kann málið kann verða avgjørt uttan rættarmál.

Í eftirkanningini varð spurt, um hesi málini eru egnað til at avgreiða við fyri-sitingarligum sektaruppskoti, t.v.s. eru av sama slagi, eru einføld og uttan próvlig ivamál, og um dómsvaldið hevur lagt sektarstøðið fast viðvíkjandi tí ítøkiliga lógarbrotinum.

Fyrisitingarligt sektaruppskot er ein revsirættarlig avgerð, sum ein fyrisitingar-myndugleiki kann gera uppskot til, og sum eigur at vera nýtt við varsemi og bert í heilt serligum førum. Fyrisitingarlig sektaruppskot víkja frá meginregluni um, at revsimál verða viðgjørd av teimum myndugleikum, sum hava serkunnleika á revsiøkinum (politi, ákæruvald og dómstólar), og tað kann tí setast spurnartekn við rættartrygdina hjá tí einstaka. Treytirnar fyri at brúka henda avgerðarhátt eru tí strangar.

Tað er umráðandi at hava fyri eyga, at talan er um revsing, og tí er tað eisini ein treyt fyri at nýta fyrisitingarlig sektaruppskot í einum ítøkiligum máli, at dómsvaldið hevur lagt sektarstøðið fast viðvíkjandi tí ítøkiliga lógarbrotinum. Tað er sostatt ikki fyrisitingin, sum avgerð, hvussu hørð revsingin skal vera. Hetta hevur við sær, at tey fyrstu málini um brot á eina áseting, sum kann revsast við fyrisitingarligum sektaruppskot, skulu leggjast fyri rættin, sum ger av, hvat sektarstøðið fyri brotini er.

## 1.9. At umseta danskt mál til føroyskt

Eitt uppskot til kunngerð var gjørt við eini danskari kunngerð sum fyrimynd. Í uppskotinum var danska orðið „trusler“ umsett til „hóttanir“, sum varð nýtt í sambandi við óheftni hjá grannskoðarum. Í eftirkanningini varð víst á, at tá ið hendan orðing verður nýtt, tykist tað, sum talan er fysiskar hóttanir, men av tekstinum sást, at talan var um ymisk viðurskifti, sum kunnu skapa iva um gegnið og óheftni hjá grannskoðarum. Hildið var, at orðingin gruggar fatanina av greinini og spurt varð, um man kanska heldur kundi nýtt orðingina „viðurskifti sum skapa iva um óheftni“.

## 1.10. Nýggj lóggáva um náttúruvernd

Tað yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum var at fáa til vega dagførda lóggávu til at verja føroysku náttúruna við øllum hennara margfeldi. Endamálið er at røkja lív-, landslags- og jarðfrøðimargfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

Í uppskotinum var ásett, at veiða og onnur tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, bara kann fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg, og at heysting og onnur tøka av villum plantum einans er loyvd, tá ið hon ikki hóttir stovnin á staðnum ella er avmarkað við lóg ella við heimild í lóg.

Í eftirkanningini varð víst á, at hetta brýtur fullkomiliga við núverandi útgangsstøði, har alt livandi tilfeingi, sum tað ikki er lóggivið um, kann veiðast frítt. Somuleiðis tóktist tað at vera løgið at lóggeva á hendan hátt, havandi í huga at Føroyar vanliga meta seg sum eitt veiðumannasamfelag. Slík áseting er ógvuliga víðfevnd, serliga tá hugsað verður um meginregluna um ikki at lóggeva, uttan at tað er neyðugt. Spurningurin var eisini, um tað bar til at yvirskoða avleiðingarnar, t.d. hvussu er við skaðadýrum sum mús og rottu, er ikki loyvt at fanga hesi uttan so, at tað er lóggivið um tað?

Um ásetingin skuldi varðveitast, varð mælt til at greiða nærri frá hesum í viðmerkingunum til lógaruppskotið, og at greiða frá, hví at ásetingin er neyðug.

## 1.11. Tvingsilssektir

Í einum lógaruppskoti var landsstýrismanninum heimilað at áleggja tvingsilssektir sum munagott amboð at tryggja, at ásetingarnar í lóggávuni verða fylgdar.

Hóast tvingsilssektir ikki eru revsing, verða tær ofta fataðar sum revsing, og hesar sektir hava ikki somu rættartrygd, sum tvingsilssektir, ið eru ásettar av rættinum. Fyrisitingarligar tvingsilssektir eru eitt víðfevnt tvingsilsinntriv og eiga tí sum meginregla at verða brúktar við størsta varsemi, og einans tá ið tørvur er á munadyggari stýring og handhevjan, og tá ið talan er um viðurskiftir, sum eru løtt at staðfesta. Av tí, at tað í hesum føri var talan um heilt nýggja lóggávu, og at førleikarnir innan økið mugu byggjast upp, var tað ivasamt, um tað bara til at siga, at talan her var um viðurskiftir, sum eru løtt at staðfesta.

Í eftirkanningini varð mælt til at greiða væl frá í viðmerkingunum til lógaruppskotið, hví tørvur er á heimild at áleggja tvingsilssektir innan hetta økið og møguliga eisini greiða frá, í hvørjum førum ætlanin var at brúka hesa heimildina. Viðmerkjast skal, at í lógaruppskotinum var eisini heimilað landsstýrismanninum at sleppa áløgdum tvingsilssektum.

## 1.12. Pantiheimild

Í lógaruppskoti var heimild til at tvingsilskrøv kundu krevjast inn við panting. Tað ber í sær, at álagdar tvingsilssektir kunnu krevjast inn uttan lógsókn og dóm.

Í eftirkanningini varð viðmerkt, at pantiheimild er eitt víðfevnt tvingsilsinntriv, sum eigur at vera væl umhugsað. Sum meginregla eigur pantiheimild einans at verða sett inn í løgtingslógina, tá ið talan er um slag av skuld, sum nógvir persónar kunnu hava. Tvingsilssektir kunnu neyvan roknast tílíkt slag av skuld. Mett var, at um talan einans var um nøkur einstøk peningakrøv og fáar persónar, átti slík víðfevnd heimild ikki at verið neyðugt at havt í løgtingslógini.

Við atliti at rættartrygdini eigur ein myndugleiki bara at fáa pantingarrætt viðvíkjandi krøvum, sum frammanundan verður væntað ikki hava við sær próvligar ella rættarliga ósemjur.

### 1.13. Líkagrundreglan og saklig atlit

Í broytingaruppskoti til løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur var skotið upp at avtaka ferðastuðulin í Eysturoyar- og Sandoyartunnilin, men at varðveita ferðastuðulin viðvíkjandi hinum tunlunum.

Í eftirkanningini varð spurt, um tað er at gera mismun at veita stuðul fyri at koyra ígjøgnum summar tunlar og ikki aðrar. Hvat um talan var um sjóleiðir; kundi man veitt stuðul til Svínoyarleiðina og ikki til Skopunarleiðina.

Lógartænastan viðmerkti, at í útgangsstøðinum eigur munur ikki at gerast á borgarum í landinum. Um munur skal vera á stuðli t.d. at koyra gjøgnum ymiskar undirsjóvartunlar, eiga tað at vera upplýst, hvørji saklig atlit kunnu grundað, at stuðulin er ymiskur.

### 1.14. Tung og teknisk uppskot

Í eftirkanningini av uppskoti um broyting í løgtingslóg um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum varð viðmerkt, at tað var neyðugt at greiða nærri og betri frá innihaldinum í uppskotinum. Talan var um eitt sera tungt og tekniskt orðað uppskot, sum tí var ringt at gjøgnumskoða og skilja, um ein ikki hevur serligt innlit í skatta- og roknskaparviðurskifti.

Uppskotið hevði ikki verið sent til ummælis, og hetta var grundað á, at endamálið við uppskotinum hevði verið forkomið við eini hoyring. Lógartænastan viðmerkti, at um avgerandi høvuðsregla eiga lógaruppskot at verða send til ummælis. Uppskotið hevði fleiri víðfevndar ásetingar, so stjórnarráðið átti at greiða nærri frá, hví uppskotið ikki var sent til ummælis, og hvat tað var í uppskotinum, sum hevði verið forkomið við at senda tað til hoyringar. Tess meira víðfevnd inntrivini eru, betri má greiðast frá, hví hesi eru neyðug.

### 1.15. Heimild at móttaka gávu frá privatum grunni

Eins og tað er neyðugt hjá landsstýrinum at hava heimild at brúka pening, so krevst eisini heimild at móttaka eina størri gávu. Í uppskoti til løgtingslóg um heimild at taka ímóti peningaupphædd frá Novo Nordisk Fonden fekk landsstýrismaðurin heimild at taka ímóti 121 mió. kr. frá Novo Nordisk Fonden

Ásett var, at upphæddin skuldi brúkast í tíðarskeiðinum 1. januar 2023 til 31. desember 2032 til at fíggja rakstur og løgur í samstarvinum partanna millum um átøk innan viðgerð, tvørgeiraligt samstarv og gransking innan diabetes og endokrinologiskar sjúkur annars. Sambært avtaluni bant landsstýrið seg herumframt til at hava ávíst virksemi í bygninginum í eitt 30 ára skeið.

### 1.16. Bráðfeingis bann

Í uppskoti til kunngerð var heimild til at lýsa bráfeingis bann fyri grindadrápi í ávísari hvalvág í upp til 3 mánaðir, um nóg mikið av grind var í grindaumdøminum, sum hoyrir til hvalvágna. Ásett var at bráðfeingis bann skal lýsast í Kringvarpi Føroya. Í eftirkanningini spurdi lógartænastan, um bráðfeingis bannið ikki átti at verði kunngjørt í kunngerðablaðnum.

### 1.17. Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 7.7. <u>Ríkislógartilmæli</u>: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.8. <u>Bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse</u>: Sambært stýrisskipanarlógini § 48 er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at seta í gildi fyri Føroyar. Eftirkanningin av hesum fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um uppskot til kunngerðir, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama, tí talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.
>
> 7.9. Við eftirkanningini sambært nr. 7.7. og 7.8. verður serliga hugt eftir, um tað í innganginum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi fyri Føroyar, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.

Ríkislóggáva er t.d. serstakar fólkatingslógir fyri Føroyar og kongligar fyriskipanir umframt danskar kunngerðir. Hesi uppskot skulu eisini sendast lógartænastuni til eftirkanningar. Donsk lógaruppskot og fyriskipanaruppskot senda stjórnarráðini sum oftast til eftirkanningar, tá ið uppskotið er klárt at senda til landsstýrisfund, soleiðis sum ásett er í rundskrivinum um eftirkanning.

Tá ið talan er um størri lógaruppskot, mælir lógartænastan til, at danska lógaruppskotið ella fyriskipanaruppskotið verður sent lógartænastuni til undaneftirkanning, áðrenn tað verður sent til ummælis. Hetta soleiðis at møguligar tøkniligar villur og tilvísingar til føroyska lóggávu kunnu verða rættaðar av ríkismyndugleikunum, áðrenn uppskotið verður sent út til ummælis.

Danskar kunngerðir (bekendtgørelser) skulu eisini sendast til eftirkanning. Hetta tykjast øll stjórnarráðini ikki at geva sær nóg nógv fær um, tí tað kemur meira enn so fyri, at lógartænastan fyrstu ferð sær danskar kunngerðir, tá tær verða sendar til kunngering í Kunngerðablaðnum.

Vit fara enn einaferð at heita á stjórnarráðini um at minnast til at senda bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelser til eftirkanning, tá tey fáa uppskotini til ummælis frá ríkismyndugleikunum.




# 2. Tøkniliga eftirkanningin

## 2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 6.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir ásetingunum í rundskrivi um lógarsmíð og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.
>
> 6.2. Er avvarðandi stjórnarráð og lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til lógartænastuna hesum viðvíkjandi.
>
> 6.3. Uppskot til rundskriv og leiðbeiningar verða einans tøkniliga eftirkannað. Tó so, um okkurt eyðsýnt ivamál er, so verður hetta nevnt.

Lógartænastan eftirkannar uppskot við støði í galdandi **rundskrivi um lógarsmíð**, sum kom í gildi 1. januar 2018.

Viðvíkjandi tí tøkniliga partinum av eftirkanningini er tað framvegis soleiðis, at onkur av stjórnarráðunum ikki geva sær nóg nógv far um, at tað er tað eftirkannaða uppskotið (skjalið), sum skal sendast til Løgtingið ella til kunngering.

## 2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti

Tað kemur eisini fyri, at stjórnarráðini broyta uppskotið, eftir at tað hevur verið til eftirkanningar, t.d. strika ella seta nýggjar ásetingar inn. Tá hava vit eisini seinni sæð, at broytingin ikki er sett rætt upp tøkniliga. Vit mæla til, at um broytingar verða gjørdar í uppskotinum aftan á eftirkanningina, at stjórnarráðini senda uppskotið til endureftirkanning. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

## 2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur

Uppskot, sum er burturfallið í Løgtinginum, t.d. tí tingsetan endaði, áðrenn uppskotið var liðugt viðgjørt, og sum landsstýrið aftur ætlar at leggja fyri Løgtingið, skal sendast til eftirkanning eins og onnur uppskot, hóast uppskotið hevur verið eftirkannað í eini fyrru tingsetu. Tað vísir seg ofta, at smærri broytingar eru gjørdar, og at tøkniligar villur sníkja seg inn aftur í uppskotið. Hesi

uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

### 2.4. Skabelónir

Lógartænastan hevur gjørt 8 skabelónir til: løgtingslóg, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg, uppskot til samtyktar, javntekst, kunngerð, kunngerð um broyting í kunngerð, ríkislógartilmæli, rundskriv og leiðbeiningar.

Nýggjasta útgávan er altíð at finna á breddanum hjá lógartænastuni á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni:
**www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/word-skabelonir-til-logarsmid**

Øll sum gera uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar o.a. eiga at brúka skabelónirnar, tí hetta ger, at uppskotini verða tøkniliga rætt sett upp.

# 3. Yvirlit yvir eftirkanningar

### 3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 2.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll uppskot til løgtingslóg, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.
>
> 2.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini allar kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna.
>
> 2.3. Lógartænastan eftirkannar eisini uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Í løgtingsárinum 2021 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 212 uppskot frá øllum sjey stjórnarráðunum. Hetta er 22 uppskot færri enn í tingárinum 2020.

Nøgdin av uppskotum sigur tó ikki alt, tí uppskotini kunnu vera sera ymisk bæði í longd, torleika og margfeldi. Soleiðis var eisini í hesum tingárinum.

**Talva 1**

| Eftirkanningar íalt | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | 19 | 11 | 14 | 23 | 29 | 26 | 21 | 28 |
| Kunngerð | 69 | 74 | 97 | 88 | 93 | 76 | 97 | 76 |
| Broytingarlóg | 75 | 64 | 50 | 46 | 72 | 48 | 56 | 42 |
| Broytingarkunngerð | 35 | 36 | 50 | 65 | 54 | 39 | 47 | 54 |
| Ríkislógartilmæli | 27 | 3 | 11 | 12 | 6 | 6 | 8 | 7 |
| Uppsk. til samtyktar | 3 | 1 | - | 1 | 2 | 3 | 1 | 1 |
| Stovnar | | | | 5 | 1 | - | 1 | 1 |
| Rundskriv | | | | 6 | 8 | 2 | 1 | 3 |
| Leiðbeining | | | | 2 | - | 2 | 2 | - |
| Kirkjulig fyriskipan | | | | | | 1 | - | - |
| **Íalt** | **228** | **189** | **222** | **248** | **265** | **202** | **234** | **212** |

## 3.2. Yvirlit yvir uppskotini

Niðanfyri er yvirlit yvir uppskotini frá teimum einstøku stjórnarráðunum. Tølini eru fyri løgtingsárini 2014 - 2021.

**Talva 2**

| Løgmansskrivstovan | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014*** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | - | - | 1 | - | - | - | 1 | 3 |
| Kunngerð | - | 3 | 12 | - | 2 | - | 1 | 3 |
| Broytingarlóg | 2 | - | 4 | 1 | 5 | 2 | 1 | 4 |
| Broytingarkunngerð | - | - | 3 | - | - | - | - | 2 |
| Ríkislógartilmæli | - | 1 | 3 | - | 1 | 3 | 1 | 3 |
| Uppsk. til samtyktar | 3 | - | - | - | - | - | - | - |
| Rundskriv | - | - | - | - | 1 | - | - | - |
| Kirkjulig fyriskipan | - | - | - | - | - | 1 | - | - |
| **Íalt** | **5** | **4** | **23** | **1** | **9** | **6** | **4** | **15** |

***** Uttanríkistænastan partur av LMS

**Talva 4**

| Umhvørvis- og vinnumálaráðið | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014*** | **2015**** | **2016**** | **2017**** | **2018**** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | 2 | 1 | 4 | 7 | 3 | 10 | 7 | 4 |
| Kunngerð | 11 | 9 | 17 | 26 | 12 | 21 | 13 | 21 |
| Broytingarlóg | 19 | 6 | 7 | 5 | 7 | 9 | 11 | 7 |
| Broytingarkunngerð | 6 | 3 | 6 | 7 | 6 | 9 | 3 | 10 |
| Ríkislógartilmæli | 6 | 1 | 1 | - | 1 | 2 | 2 | 4 |
| Uppsk. til samtyktar | - | 1 | - | 1 | 2 | - | - | 1 |
| Rundskriv | | | | - | 2 | - | | - |
| Leiðbeining | | | | - | - | - | 1 | - |
| Stovnar*** | | | | 5 | 1 | - | 1 | - |
| **Íalt** | **44** | **21** | **35** | **51** | **34** | **51** | **38** | **47** |

* Vinnumálaráðið **Uttanríkis- og vinnumálaráðið ***Sjóvinnustýrið og Fjarskiftiseftirlitið

**Talva 3**

| Fíggjarmálaráðið | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | 5 | 3 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 4 |
| Kunngerð | 8 | 10 | 3 | 7 | - | 12 | 13 | 9 |
| Broytingarlóg | 16 | 24 | 10 | 14 | 21 | 17 | 20 | 18 |
| Broytingarkunngerð | 1 | 1 | 8 | 5 | 2 | 5 | 10 | 9 |
| Ríkislógartilmæli | 19 | - | 3 | 11 | 3 | - | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Rundskriv | - | - | - | 6 | 4 | 2 | 1 | 2 |
| Leiðbeining | - | - | - | 1 | - | - | - | - |
| **Íalt** | **49** | **38** | **26** | **47** | **34** | **41** | **50** | **42** |

**Talva 5**

| Fiskimálaráðið | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | 4 | 2 | 3 | 4 | 1 | 1 | - | - |
| Kunngerð | 29 | 28 | 29 | 33 | 31 | 34 | 30 | 28 |
| Broytingarlóg | 6 | 8 | 4 | 3 | 6 | 3 | 5 | 3 |
| Broytingarkunngerð | 14 | 12 | 18 | 21 | 24 | 11 | 15 | 18 |
| Ríkislógartilmæli | - | - | 1 | - | - | - | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - | - | - | - | 1 | - |
| Leiðbeining | | | | 1 | - | 1 | - | - |
| **Íalt** | **53** | **50** | **55** | **62** | **62** | **50** | **51** | **49** |

**Talva 6**

| Uttanríkis- og mentamálaráðið | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014*** | **2015*** | **2016*** | **2017*** | **2018*** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | 6 | 1 | 2 | 1 | 5 | 4 | 4 | 7 |
| Kunngerð | 7 | 9 | 4 | 6 | 22 | 5 | 15 | 7 |
| Broytingarlóg | 10 | 9 | 6 | 7 | 4 | 2 | 2 | 4 |
| Broytingarkunngerð | 3 | 8 | 3 | 6 | 10 | 3 | 5 | 5 |
| Ríkislógartilmæli | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - | - | - | 3 | - | 1 |
| Rundskriv | - | - | - | - | 1 | - | - | 1 |
| **Íalt** | **26** | **27** | **15** | **20** | **42** | **17** | **26** | **25** |

* Mentamálaráðið

**Talva 7**

| Almannamálaráðið | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | - | 2 | 1 | 5 | 4 | 4 | 2 | 3 |
| Kunngerð | 1 | 4 | 14 | 1 | 4 | 1 | 16 | 3 |
| Broytingarlóg | 15 | 8 | 9 | 9 | 16 | 12 | 15 | 4 |
| Broytingarkunngerð | 2 | 4 | 2 | 1 | 5 | 5 | 9 | 2 |
| Ríkislógartilmæli | - | - | - | - | - | - | 1 | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Leiðbeining | - | - | - | - | - | 1 | 1 | - |
| **Íalt** | **18** | **18** | **26** | **16** | **29** | **23** | **44** | **12** |

**Talva 8**

| Heilsumálaráðið | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2014** | **2015*** | **2016*** | **2017*** | **2018*** | **2019** | **2020** | **2021** |
| Løgtingslóg | 2 | 1 | 1 | 2 | 5 | 2 | 1 | 7 |
| Kunngerð | 9 | 9 | 10 | 10 | 18 | 3 | 9 | 5 |
| Broytingarlóg | 7 | 6 | 7 | 5 | 7 | 3 | 2 | 2 |
| Broytingarkunngerð | 9 | 7 | 6 | 18 | 3 | 6 | 5 | 8 |
| Ríkislógartilmæli | 2 | 1 | 3 | 1 | 1 | 1 | 4 | - |
| Uppsk. til samtyktar | - | - | - | - | - | - | - | - |
| **Íalt** | **29** | **24** | **27** | **36** | **34** | **15** | **21** | **22** |

***** Heilsu- og innlendismálaráðið

## 3.3. Hvat siga tølini?

## Nøgd av uppskotum

Mynd 1




Verður hugt eftir býtinum av teimum 212 uppskotunum millum løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskotum til samtyktar í tingárinum 2021 í mun til í 2020 sæst, at tað eru nakað fleiri høvuðslógir og broytingarkunngerðir útgivin í tingárinum 2021 í mun til í 2020. Kunngerðir og broytingarlógir vóru eitt sindur færri av.

Flestu uppskotini høvdu Fiskimálaráðið 49, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 47 og Fíggjarmálaráðið 42, síðani kemur Uttanríkis- og mentamálaráðið 25 og Heilsumálaráðið 22, meðan hini uppskotini eru býtt millum Løgmansskrivstovuna 15 og Almannamálaráðið 12. Almannamálaráðið hevði fæst uppskot.

Av teimum 212 uppskotunum vóru 28 *nýggjar løgtingslógir* í mun til 21 í 2020. Ein nýggj løgtingslóg merkir, at tað verður lóggivið um nakað, sum tað ikki fyrr er

lóggivið um, ella at lóggávan á økinum verður endurnýggja og umskipað soleiðis, at tað ikki er nøktandi at gera broytingar í eini galdandi løgtingslóg. Av teimum 28 lógaruppskotunum átti Uttanríkis- og mentamálaráðið 7, Heilsumálaráðið 7, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 4, Fíggjarmálaráðið 4, Almannamálaráðið 3, og Løgmansskrivstovan 3. Fiskimálaráðið hevði onki.

Tað vóru 42 uppskot um at gera *broytingar í galdandi løgtingslógum*. Hetta er eitt sindur færri enn í 2020, tá tað vóru 56 uppskot til broytingarlógir. Av hesum átti Fíggjarmálaráðið nóg flest 18, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 7, Almannamálaráðið 4, Uttanríkis- og mentamálaráðið 4, Løgmansskrivstovan 4, Fiskimálaráðið 3, og Heilsumálaráðið 2.

Tølini vísa eisini, at Løgmansskrivstovan og Umhvørvis- og vinnumálaráðið høvdu væl fleiri uppskot, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Fiskimálaráðið og Heilsumálaráðið nakað tað sama, meðan Fíggjarmálaráðið hevði færri og serstakliga Almannamálaráðið hevði nógv færri uppskot í tingárinum 2021 enn í 2020.

Av samlaðu eftirkannaðu uppskotunum átti Umhvørvis- og vinnumálaráðið 47, Fiskimálaráðið 49, Fíggjarmálaráðið 42, Almannamálaráðið 12, Uttanríkis- og mentamálaráðið 25, Heilsumálaráðið 22, og Løgmansskrivstovan 15.

Tað sæst týðuliga, at tað serliga eru kunngerðirnar, sum tað eru flest av í eftirkanningini. Av teimum 212 uppskotunum vóru 130 kunngerðir, av hesum

## Gongdin í slagi av rættarreglum 2014-2021

**Mynd 2**




76 nýggjar kunngerðir og 54 broytingarkunngerðir. T.v.s. at 61% av eftirkanningunum í tingárinum 2021 vóru kunngerðir.

Afturímóti vóru 70 lógaruppskot, av hesum 28 nýggjar lógir og 42 broytingarlógir; hetta svarar til 33% av eftirkannaðu uppskotunum. Ríkislógartilmælini vóru 7 í tali svarandi til 3%. Seinastu 2% eru uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar.

### 3.4. Longd á eftirkanning

Rundskrivið um eftirkanning ásetir:

> 3.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.

Í løgtingsárinum 2021 blivu 95% av uppskotunum eftirkannað innan 5 dagar, ið er minst ásetta tíðin, sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Hetta er ein framgongd á uml. 2% í mun til løgtingsárið 2020, og er tað besta úrslitið fyri øll 8 árini, har eftirkanningar eru skrásettar.

99% av uppskotunum í 2021 vóru eftirkannað innan 8 yrkadagar. Hetta er tað sama sum í 2020. Einans 1% av uppskotunum vóru eftirkannað millum 9 dagar ella longri.

**Talva 9**

| Longd á eftirkanning | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1-5 dagar | | 6-8 dagar | | 9 dagar ella longri | | Íalt |
| | Tal | % | Tal | % | Tal | % | |
| 2014 | 178 | 77,7 | 32 | 14,0 | 19 | 8,3 | 229 |
| 2015 | 171 | 89,5 | 5 | 2,6 | 15 | 7,9 | 191 |
| 2016 | 170 | 76,6 | 20 | 9,0 | 32 | 14,4 | 222 |
| 2017 | 206 | 83% | 22 | 9% | 20 | 8% | 248 |
| 2018 | 234 | 89% | 20 | 7% | 11 | 4% | 265 |
| 2019 | 185 | 92% | 9 | 4% | 8 | 4% | 202 |
| 2020 | 220 | 93% | 15 | 6% | 1 | 1% | 234 |
| 2021 | 201 | 95% | 9 | 4% | 2 | 1% | 212 |

## Longd á eftirkanning 2014-2021

Mynd 3




Tað sæst at øll árini síðani 2014 vísir myndin eitt støðugt úrslit viðvíkjandi eftirkanningunum, har millum 76% og 95% av uppskotunum eru eftirkannaði innan 5 dagar, sum er freistin sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Eisini er tað gott at tað seinastu árini einans eru nøkur heilt fá uppskot, har eftirkanningin hevur tikið 9 dagar ella longri.

# 4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum

Tað sæst á tølunum, at tað vóru eftirkannað 212 uppskot hjá øllum stjórnarráðunum tilsamans. Av hesum vóru 28 høvuðslógir, 42 broytingarlógir og 7 ríkislógartilmæli. Eisini var eitt uppskot til samtyktar eftirkannað. Hetta er tilsamans 78 uppskot.

Landsstýrið legði 77 uppskot fyri Løgtingið. Av hesum vóru 65 lógaruppskot, 11 ríkislógartilmæli og 1 uppskot til samtyktar. Løgtingið samtykti 70 av uppskotunum, 1 uppskot varð tikið aftur, meðan 6 uppskot fullu burtur.

At tað ikki er samsvar millum tal av eftirkannaðum uppskotum og tal av framløgdum uppskotum í tinginum kann koma av, at eitt eftirkannað uppskot ikki er lagt fyri Løgtingið. Tað kemur tó eisini fyri, at sama uppskot verður broytt aftan á eftirkanningina, verður sent til eftirkanningar umaftur, og at uppskotið tískil er eftirkannað meira enn eina ferð. Heldur ikki kann útihýsast, at okkurt uppskot, sum er eftirkannað, ikki er skrásett í yvirlitinum hjá lógartænastuni.

Tað sæst, at av uppskotunum hjá landsstýrinum vóru 84% løgtingslógaruppskot, 14% ríkislógartilmæli, t.e. felagslóggáva og 1% uppskot til samtyktar. Av hesum fullu 7% av uppskotunum burtur.

## Uppskot landsstýrisins samtykt í Løgtinginum

Mynd 4




### 4.1. Løgmansskrivstovan

Hjá Løgmansskrivstovuni vóru 10 lógaruppskot eftirkannað. Av hesum vóru 3 løgtingslógaruppskot, 4 broytingaruppskot og 3 ríkislógartilmæli. Løgmaður legði 12 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti øll uppskotini.

### 4.2. Fíggjarmálaráðið

Tað vóru eftirkannað 22 lógaruppskot hjá Fíggjarmálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir og 18 broytingarlógir. Landsstýrismaðurin legði 20 uppskot fyri Løgtingið. Av framløgdu uppskotunum vóru 16 uppskot samtykt, meðan 4 fullu burtur.

### 4.3. Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Tað vóru eftirkannað 15 lógaruppskot hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir, 7 broytingarlógir og 4 ríkislógartilmæli. Landsstýrismaðurin legði 16 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti 14 av uppskotunum, meðan 2 uppskot fullu burtur.

### 4.4. Fiskimálaráðið

Tað vóru eftirkannað 3 uppskot hjá Fiskimálaráðnum. Landsstýrismaðurin legði 3 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti øll uppskotini.

### 4.5. Uttanríkis- og mentamálaráðið

Tað vóru eftirkannað 11 uppskot hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Av hesum vóru 7 høvuðslógir og 4 broytingarlógir. Landsstýrismaðurin legði 10 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti øll uppskotini.

### 4.6. Almannamálaráðið

Tað vóru eftirkannað 7 lógaruppskot hjá Almannamálaráðnum. Av hesum vóru 3 høvuðslógir, 4 broytingarlógir. Landsstýrismaðurin legði 8 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti øll uppskotini.

### 4.7. Heilsumálaráðið

Tað vóru eftirkannað 9 lógaruppskot hjá Heilsumálaráðnum. Av hesum vóru 7 høvuðslógir og 2 broytingarlógir. Landsstýrismaðurin legði 8 uppskot fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti 7 av uppskotunum, meðan 1 uppskot varð tikið aftur.

### Úrslitið í Løgtinginum í 2017, 2018, 2019, 2020 og 2021

Mynd 5




# 5. Ummælisportalurin

Uppskot eiga altíð at verða send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og vanliga eigur tíðarfreistin at lata inn ummæli at vera 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd uttan so, at tað er átrokandi neyðugt.

Eftir áheitan frá MEGD verður mælt til, at stjórnarráðini í størst møguligan mun eisini senda uppskot til ummælis hjá MEGD.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða send til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

*Umframt* at stjórnarráðini senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini leggjast á ummælisportalin á heimasíðuni hjá landsstýrinum, sum øll hava atgongd til.

Ummælisportalurin sæst her:
**www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/**

Á heimasíðuni hjá stjórnarráðunum ber eisini til einans at síggja tey uppskot, sum viðkomandi ráðið hevur til ummælis.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini nú eru meira tilvitað um at leggja fyrireikingararbeiðið við lógaruppskotum soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð til, at uppskot kunnu verða send til ummælis sum høvuðsregla í 4 vikur.

Enn er tað tó soleiðis, at orsakað av tíðarneyð verður ummælistíðin ofta skerd, heilt niður í nakrar dagar, og í hesum førunum verða uppskotini ofta heldur ikki løgd á almenna ummælisportalin. Hetta hevur við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verið.

### 5.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin

Grundarlagið fyri hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein uppteljing av teimum uppskotum, sum hava verið løgd út alment til ummælis á ummælisportalinum á heimasíðuni hjá landsstýrinum. Tað merkir, at uppskot, sum als ikki hava verið send til ummælis, ella sum einans hava verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi uttanhýsis pørtum, ikki eru við í hesi uppteljing. Yvirlitið vísir sostatt einans ummælisfreistir fyri tey uppskot, sum hava verið á ummælisportalinum.

## 5.2. Ummælisfreistir

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2021 løgdu stjórnarráðini tilsamans 79 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Av hesum vóru 33 løgtingslógaruppskot, 39 kunngerðir, 6 ríkislógartilmæli og 1 uppskot til samtyktar.

**Talva 10**

| Ummælisfreistir | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2017 | | 2018 | | 2019 | | 2020 | | 2021 | |
| | Nøgd | % | Nøgd | % | Nøgd | % | Nøgd | % | Nøgd | % |
| 1 - 14 dagar | 22 | 29% | 34 | 33% | 17 | 29% | 30 | 30% | 27 | 34% |
| 15 - 27 dagar | 38 | 49% | 33 | 33% | 27 | 46% | 35 | 36% | 27 | 34% |
| 28 dagar ella longri | 17 | 22% | 35 | 34% | 15 | 25% | 33 | 34% | 25 | 32% |
| **Íalt** | **77** | **100%** | **102** | **100%** | **59** | **100%** | **98** | **100%** | **79** | **100%** |

Sum høvuðsregla eiga uppskot at verða send til ummælis í 4 vikur ella 28 dagar. Tað sæst á talvuni omanfyri, at fyri 68% av uppskotunum var ummælisfreistin í løgtingsárinum 2021 sett millum 1-27 dagar, og fyri 32% av uppskotunum var ummælisfreistin 28 dagar ella meira. Tað merkir, at tað er ein knappur triðingur av øllum uppskotunum, sum hava havt tilmæltu ummælistíðina upp á 4 vikur. Hetta er ein lítil afturgongd í mun til tingárið 2020.

Ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, verður als ikki mett at vera nøktandi. Ein ummælisfreist upp á í minsta lagi 15 dagar má roknast sum eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist. Á talvuni omanfyri sæst, at fyri 34% av uppskotunum var ummælisfreistin sett millum 1-14 dagar, og fyri 66% av uppskotunum var ummælisfreistin meira enn 15 dagar.

Tað merkir, at knappur triðingur av øllum uppskotunum ikki hava havt eina nøktandi ummælisfreist. Tað eru alt ov nógv uppskot eftir okkara tykki.

### Ummælisfreistir hjá øllum stjórnarráðum undir einum

**Mynd 6**




Myndin vísir, at ummælisfreistir á uppskotum er støðug fyri øll árini 2018-2021. Tað merkir, at øll árini hava tey flestu uppskotini - 68% - eina ummælistíð millum 15 og 27 dagar, at knappur triðingur - 32% - hevur tilmæltu ummælistíðina uppá 4 vikur, og at ein góður triðingur - 34% - hava eina ummælistíð minni enn 15 dagar, sum ikki er nøktandi.

Tað kunnu vera fleiri orsøkir til at uppskot vera send til ummælis við styttri freist enn tilmælt, t.d. tá ið talan er um skunduppskot, skattainntriv o.tíl.

## 5.3. Samanumtøka um ummælisfreistir

Øll stjórnarráðini uttan Løgmansskrivstovan og Almannaamálaráðið hava sent uppskot til ummælis við styttri freist enn 14 dagar. Tilsamans vóru 34% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum undir einum send til ummælis við styttri enn 14 daga freist, og sum nevnt frammanfyri er *ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, ikki nøktandi.*

Fyri Fiskimálaráðið er talan um 57% av teirra uppskotum, fyri Umhvørvis- og vinnumálaráðið 55%, Uttanríkis- og mentamálaráðnum 40%, meðan talan var um 20% av uppskotunum hjá Fíggjarmálaráðið og síðani 10% av uppskotunum hjá Heilsumálaráðið.

Tað er hinvegin jaligt, at 66% av uppskotunum hóast alt hava verið send til ummælis við meira enn 15 daga freist, sum má metast at vera eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist.

Tá talan er um at senda uppskot til ummælis við *tilmæltu ummælisfreistini uppá 4 vikur*, var fyri Løgmansskrivstovuna talan um 90% av teirra uppskotum, fyri Heilsumálaráðið 60%, Almannamálaráðið 50%, Fíggjarmálaráðnum 40%, og síðani 17% av uppskotunum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Uttanríkis- og mentamálaráðið 13%, meðan hjá Fiskimálaráðnum var onki av teirra uppskotum sent til ummælis við minst 4 vikurs ummælisfreist.

Fiskimálaráðið er í eini serligari støðu, tí ein stórur partur av teirra kunngerðum er um at skipa fiskiskapin. Hesar kunngerðir hava ofta skund, og tað ber tí ikki til at hava ummælisfreist uppá 4 vikur. Hesar kunngerðir verða altíð lagdar fyri Fiskivinnuráðið til ummælis, og á tann hátt verða viðkomandi partar hoyrdir. Tó sæst at Fiskimálaráðið í størri mun enn fyrr hevur eina ummælisfreist uppá 15 dagar fyri fleiri av hesum kunngerðunum og soleiðis halda seg til minstamarkið fyri ummælisfreist.

## 5.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2021 løgdu stjórnarráðini tilsamans 79 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Í mun til hetta eftirkannaði lógartænastan 212 uppskot. Eftir hesum vóru einans umleið 37% av eftirkannaðu uppskotunum løgd út til almenna hoyring á ummælisportalinum.

Tað ber ikki til beinleiðis at samanlíkna hesi tølini, tí uppskot kunnu verða send til ummælis í eini tingsetu, men tey verða ikki eftirkannað og løgd fyri Løgtingið fyrrenn í næstu tingsetu.

Hóast hesa óvissu tykist tað at vera ein rættiliga stórur munur á eftirkannaðum uppskotum og uppskotum løgd á ummælisportalin, tá munurin er 163 uppskot. Hetta merkir at 63% av uppskotunum ikki vóru løgd á ummælisportalin

Til samanberingar kann verða víst á, at í tingárinum 2020 vóru 58% av uppskotunum ikki løgd á ummælisportalin, so her gongur skeivan vegin.

### Eftirkannað uppskot og uppskot á ummælisportalinum

Mynd 7




Grái stabbin vísir talið av uppskotum hjá stjórnarráðunum, sum ikki vóru løgd á ummælisportalin.

Fyri Løgmansskrivstovuna var talan um 5 uppskot, fyri Almannamálaráðið 10 uppskot, fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið 10 uppskot, fyri Heilsumálaráðið 12 uppskot, fyri Umhvørvis- og vinnumálaráðið 29 uppskot, fyri Fíggjarmálaráðið 32 uppskot og fyri Fiskimálaráðið 35 uppskot, sum ikki vóru løga á ummælisportalin.

Vit fara at heita á stjórnarráðini um at minnast til, at øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini skulu leggjast á ummælisportalin, umframt at stjórnarráðini senda uppskot beinleiðis til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

# 6. Kunngerðablaðið

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður álagt landsstýrinum at stíla fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, kungerast.

Síðani 1. januar 2013 hevur Kunngerðablaðið einans verið givið út talgilt og ikki í pappírsútgávu sum áður. Kunngerðaportalurin gerst við hesum einasti bindandi kunngerðamiðilin til løgtingslógir, kunngerðir o.a.

Í Kunngerðablaðið A verða løgtingslógir og kunngerðir, givnar av landsstýrinum, kunngjørdar, og í Kunngerðablaðið B verða lógir og kunngerðir, ið ríkismyndugleikarnir geva út, kunngjørdar.

Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgd fyri at geva út Kunngerðablaðið. Kunngerðablaðið verður vanliga givið út fríggjadagar.

## 6.1. Kunngering í tingárinum 2021

Í tingárinum 2021 vóru tilsamans 216 løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógir og bekendtgørelser o.a. kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Av hesum vóru 189 føroyskar rættarreglur og 27 ríkisløggáva. T.v.s. at 87,5% av kunngjørdu rættarreglunum í tingárinum 2021 eru føroyskar, meðan 12,5% er donsk ríkisløggáva.

**Talva 11**

| Lov og fyriskipan | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Kunngerðir** | **Løgtings-lógir** | **Lov og fyriskipan (Anordning)** | **Bekendt-gørelse** | **Fíggjarlóg o.a.** |
| Almannamálaráðið | 4 | 9 | - | - | - |
| Fiskimálaráðið | 45 | 3 | - | - | - |
| Fíggjarmálaráðið | 16 | 17 | - | - | 8 |
| Heilsumálaráðið | 11 | 6 | 1 | 1 | - |
| Løgmansskrivstovan | 4 | 6 | 2 | 11 | - |
| Uttanríkis- og mentamálaráðið | 8 | 10 | - | 2 | - |
| Umhvørvis- og vinnumálaráðið | 26 | 9 | 7 | 3 | - |
| Íalt | 114 | 60 | 10 | 17 | 8 |

## 216 rættarreglur kunngjørdar í tingárinum 2021

**Mynd 8**




## Kunngjørdar rættarreglur tingárini 2018, 2019, 2020 og 2021

**Mynd 9**

